Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Badmintonsamband Føroya

Hoydalsvegur 23, Postboks 223, FO-110 Tórshavn

## Ársfrásøgn

## 2019

FRUMRIT

# Innihaldsyvirlit



| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2019** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnin fyri 2019 hjá Badmintonsamband Føroya.

Roknskapurin er settur upp í samsvari við góðan roknskaparsið.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2019 og og av úrslitinum av felagsins virksemi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019, í samsvari við góðan roknskaparsið og kunngerð nr. 125 frá 19 september 2011 um lógarbundns játtan og stuðulsjáttan.

Tórshavn, tann 13. juni 2020

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Erik Engelbrecht Thomsen<br>formaður | Herborg á Mýrini<br>næstformaður | Katrin Jacobsen |
| Elian Elttør | Johnny Í Grótinum | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til í Badmintonsamband Føroya**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Badmintonsamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin hjá Badmintonsamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019 í øllum týðandi lutum er gjørdur í samsvari við roknskaparháttin, sum greitt er frá um í brotinum "Nýttur roknskaparháttur".

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ársroknskap í samsvari við roknskaparháttin, sum greitt er frá um í brotinum um nýttan roknskaparhátt. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

## Átekning frá óheftum grannskoðara

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparháttturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið framtil dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 13. juni 2020

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Badmintonsamband Føroya<br>Hoydalsvegur 23<br>Postboks 223<br>FO-110 Tórshavn | |
| | Teldupostur: | bsf@bsf.fo |
| | Heimasíða: | www.bsf.fo |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Erik Engelbrecht Thomsen, formaður<br>Herborg á Mýrini, næstformaður<br>Katrin Jacobsen<br>Elian Elttør<br>Johnny Í Grótinum | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Hoyvíksvegur 5, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Badmintonsamband Føroya er gjørdur í samsvari við góðan roknskaparsið og kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

## Rakstrarroknskapur

**Inntøkur**

Inntøkan er stuðul, limainntøka og luttøkugjøld. Inntøkan er veitt felagnum innan roknskaparlok.

**Kostnaður**

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtis seg til høvuðsraksturin hjá Sambandinum.

**Fíggjarligir postar**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir eru rentuinntøkur og rentukostnaður, ásannaður og óásannaður kursvinningur og kurstap viðvíkjandi skuld og handil í fremmandum gjaldoyra. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknaðir við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**

Rakstrargøgn verða tikin við til útveganarvirði, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Tær linjeru avskrivingarnar eru grundaðar á fylgjandi metingar av væntaðu livitíðini og restvirðunum:

| | Livitíð | Restvirðið |
|---|---|---|
| Bilur | 3 ár | 5-10 % |

Smáamboð við útveganarvirði undir 20 t.kr. t.kr. verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verða uppgjørd sum munurin millum sølupris og roknskaparliga virðið á søludegnum, frádrigið sølukostnað. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrar-roknskapin undir avskrivingum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

### Skuld

Skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, verður tikin við til áljóðandi virði við roknskaparlok.

### Tíðaravmarkingar

Í tíðaravmarkingum undir skuld verða móttikin gjøld fyri inntøkur, sum viðvíkja komandi roknskaparárum, innroknað.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 2 | Inntøkur | 1.423.261 | 1.247.465 |
| 3 | Landsliðsútreiðslur | -1.075.757 | -558.502 |
| 4 | Útreiðslur til kappingar í Føroyum | -39.658 | -49.876 |
| 5 | Dómaraskeið | 0 | -605 |
| 6 | Venjaraskeið | -8.475 | -7.081 |
| 7 | Altjóða fundir | 0 | -17.355 |
| 8 | Felagskostnaður | -249.918 | -253.843 |
| 9 | Fyristingarkostnaður | -73.400 | -56.889 |
| 10 | Starvsfólkakostnaður | -315.096 | -339.378 |
| | **Bruttoúrslit** | **-339.043** | **-36.064** |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -2.814 | -1.375 |
| | **Ársúrslit** | **-341.857** | **-37.439** |

**Uppskot til býti av ársúrsliti:**

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| Býtt frá fluttum úrsliti | -341.857 | -37.439 |
| **Býtt tilsamans** | **-341.857** | **-37.439** |

# Fíggjarstøða 31. desember

## OGN

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| **Støðisogn** | | |
| Framleiðslutøl og maskinur | 0 | 4.999 |
| Materiell støðisogn tilsamans | 0 | 4.999 |
| **Støðisogn tilsamans** | **0** | **4.999** |
| **Ogn í umferð** | | |
| Vøru- og tænastuáogn | 0 | 60.000 |
| Áogn tilsamans | 0 | 60.000 |
| Tøkur peningur | 97.293 | 74.151 |
| **Ogn í umferð tilsamans** | **97.293** | **134.151** |
| **OGN TILSAMANS** | **97.293** | **139.150** |

# Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 12 | Eginogn | -206.450 | 135.407 |
| | **Eginogn tilsamans** | **-206.450** | **135.407** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 3.743 | 3.743 |
| | Tíðaravmarkingar | 300.000 | 0 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 303.743 | 3.743 |
| | **Skuld tilsamans** | **303.743** | **3.743** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **97.293** | **139.150** |

1 **Høvuðsvirksemi felagsins**

## Notur

**1. Høvuðsvirksemi felagsins**

Endamál sambandsins er at menna og skapa áhuga fyri badmintonítróttini, og vera stuðul hjá feløgunum í samarbeiði teirra millum.

| | 2019<br>kr. | 2018<br>kr. |
|---|---|---|
| **2. Inntøkur** | | |
| Stuðul frá ÍSF | 864.649 | 863.381 |
| Stuðlar | 40.000 | 0 |
| Luttøkugjald | 20.155 | 18.500 |
| Limagjøld | 0 | 80.000 |
| Avskrivað limagjøld | 0 | -20.000 |
| Stuðul frá altjóðasambondum | 29.723 | 8.381 |
| Endurgjald fyri uttanlanda tiltøk | 259.446 | 77.409 |
| Aðrar inntøkur | 159.098 | 179.794 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 50.190 | 40.000 |
| | **1.423.261** | **1.247.465** |

**3. Landsliðsútreiðslur**

| | | |
|---|---|---|
| Uppihald í Føroyum | 19.749 | 10.193 |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | 662.743 | 284.632 |
| Uppihald í útlandinum | 215.061 | 232.927 |
| Kostur í útlandinum | 128.746 | 0 |
| Leigan av høllum | 46.577 | 23.250 |
| Annað | 2.881 | 7.500 |
| | **1.075.757** | **558.502** |

**4. Útreiðslur til kappingar í Føroyum**

| | | |
|---|---|---|
| Leiga av høll | 10.000 | 0 |
| Heiðursmerkir | 26.335 | 47.288 |
| Annað | 3.323 | 2.588 |
| | **39.658** | **49.876** |

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| **5. Dómaraskeið** | | |
| Annað | 0 | 605 |
| | **0** | **605** |
| **6. Venjaraskeið** | | |
| Ferðing, koyring og annað | 8.475 | 7.081 |
| | **8.475** | **7.081** |
| **7. Altjóða fundir** | | |
| Ferðakostnaður | 0 | 17.355 |
| | **0** | **17.355** |
| **8. Felagskostnaður** | | |
| Skrivstovulutir | 700 | 1.434 |
| Útgerð | 193.677 | 229.194 |
| Gávur og graveringar | 1.320 | 730 |
| Tryggingar | 4.932 | 4.280 |
| Limagjald | 1.121 | 0 |
| Dómarakostnaður | 3.000 | 0 |
| Prent á klæði | 45.168 | 18.205 |
| | **249.918** | **253.843** |

| | 2019 kr. | 2018 kr. |
|---|---|---|
| **9. Fyristingarkostnaður** | | |
| Grannskoðan | 15.898 | 15.697 |
| Akfarskostnaður | 42.956 | 28.438 |
| Aðrar útreiðslur | 14.546 | 12.754 |
| | **73.400** | **56.889** |

## 10. Starvsfólkakostnaður

| | | |
|---|---|---|
| Løn til venjarar | 153.950 | 310.883 |
| Venjarasamsýning | 143.928 | 1.530 |
| Eftirløn | 7.138 | 12.953 |
| Samhaldsfasti, Barsilsgjald, ALS | 10.080 | 14.012 |
| | **315.096** | **339.378** |

## 11. Bilur

| | 31/12 2019 kr. | 31/12 2018 kr. |
|---|---|---|
| Kostprísur primo | 52.000 | 52.000 |
| Frágongd í árinum | -52.000 | 0 |
| **Kostprísur ultimo** | **0** | **52.000** |
| Av- og niðurskrivingar primo | 47.001 | -47.001 |
| Av-/niðurskrivingar, avhendaðar ognir | -47.001 | 0 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **0** | **-47.001** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **0** | **4.999** |

# Notur

| | 31/12 2019<br>kr. | 31/12 2018<br>kr. |
|---|---|---|
| **12. Eginogn** | | |
| Eginogn primo | 135.407 | 172.846 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | -341.857 | -37.439 |
| | **-206.450** | **135.407** |